# Tjóvstartirnir vóru døkki bletturin

**Fleiri manningar lupu avstað, áðrenn startskotið hoyrdist, men at enda lagaði tað seg á sama hátt, sum tað gjørdi í fyrsta róðrinum**

8-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*




*Við olympiska meistaranum umborð tykist Nevið Reyða veruliga hava sett seg á áttamannafarsróðurin í ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað tørnaði soleiðis út, sum tað gjørdi í róðrinum á Norðoyastevnu. Nevið Reyða úr Klaksvík kom fyrstur um málstrikuna, og kappingin frá Kvívíkingi var ógvuliga hørð. Tá ið bátarnir fóru um málið, var skuturin á muni. Tað var hann eisini í Klaksvík.

Kvívíkingur legði bragdliga fyri. Hann var leingi eitt sindur frammanfyri Nevið Reyða. Klaksvíkingar royndu at svara aftur. Teir vunnu eitt sindur inn á fremsta bátin. So dragnaði aftur, men tá ið farið varð undir endaspurtin, hevði Nevið Reyða vunnið seg fram í oddin, og so vóru tað teir, sum stýrdu kappingini.

-Vit kendu, at vit høvdu tak á tí. Kvívíkingur royndi, og hann bjóðaði orduliga av, men vit høvdu yvirskotið, sum var neyðugt, staðfestu teir umborð á Nevinum Reyða.

Meistararnir av Argjum endaðu aftur hesa ferð á triðja plássinum. Teir vóru eina bátslongd aftanfyri Kvívíking, og teir vóru gott og væl leysir av Ørvi.

Starturin hevur nógv at siga. At fáa serliga góðan start kundi vera heilivágurin, sum skuldi nýtast fyri at fáa betri endastøðu, enn tað eydnaðist at fáa í Klaksvík. Tað tóktist at vera hugburðurin hjá fleiri manningum í Hósvík. Tvær ferðir var neyðugt at starta umaftur, tí bátar høvdu tjóvstartað. Hesin veruleikin bar við sær, at tað í Hósvík og eisini síðani hevur verið tosað um, at sektar reglurnar áttu at verið herdar, so tað slapast undan tjóvstartum av tí slagnum, sum vóru at síggja í kappingini millum 8-mannaførini. Teir vóru døkkir blettir í annars fínari kapping.

**Úrslit, 8-mannafør**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Nevið Reyða | | 06:58.07 |
| 2 | Kvívíkingur | 1G | 06:59.10 |
| 3 | Argjabáturin | 1G | 07:03.15 |
| 4 | Ørvur | 1G | 07:08.08 |
| 5 | Árnfirðingur | | 07:19.17 |
| 6 | Miðvingur | | 07:19.22 |
| 7 | Knørrur | | 07:34.05 |

# Gongurólvur og Jarnbardur í harðari kapping

**Sølmundur, sum á Norðoyastevnu var á bronsuplássi, hekk fastur í startinum, og so duttu teir heilt burtur ímillum**

6-MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*



*Gongurálvur var aftur fremstur, men hesaferð var kappingin frá Jarnbardi sera hørð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er eingin loyna. Bæði í Havnar Róðrarfelag og í Róðrarfelagnum NSÍ fylgja teir serliga væl við í, hvussu tað hilnast hjá 6-mannaførunum hjá feløgunum báðum. Orsøkin er so líka til. Í báðum feløgunum verður vónað og roknað við, at teir, sum í ár manna ávikavíst Gongurólv og Sølmund, kanska longu næsta ár fara at vera við til at manna 10-mannaførini hjá feløgunum.

Higartil hevur tað hilnast heilt væl hjá Gongurólvi. Teir vunnu sannførandi í Klaksvík, har teir vóru meiri enn leysir av Jarnbardi, sum vann næstfremsta plássið í harðari kapping við Sølmund.

Í Hósvík var Gongurólvur aftur fremstur. Hesa ferð var munurin aftur til Jarnbard heilt lítil. Gongurólvur var fremstur allan teinin. Jarnbardur fekk einki serligan start. Men so gekk væl hjá teimum. Teir syftu fleiri á vegnum, og í endaspurtinum bjóðaðu teir orduliga av. Á málinum vóru teir bara skutin aftanfyri Gongurólv.

Hjá teimum umborð á Sølmundi royndist tað ikki so væl í Hósvík. Tað var ikki tí, at teir vóru verri rógvarar, enn teir vóru fjúrtan dagar frammanundan. Heldur var tað tí, at teir høvdu trupulleikar at sleppa leysir av fasta startinum. Tað kom dátt við hjá teimum. Teir høvdu roynd fasta startin tvær ferðir, meðan teir høvdu hitað upp.

Tá ið bátarnir vórðu lagdir, fingu teir boð um at taka í annan krók, enn teir høvdu roynt og sum teir á dráttinum høvdu fingið boð um. Tá miseydnaðist tað. Einki var at siga til, at teir umborð á Sølmundi vóru í kolkjallaranum. Men kanska tað birtir uppaftur meiri uppundir, so teir leygardagin á Jóansøku fara at geva Gongurólvi og Jarnbardi ein skarpan gang.

**Úrslit, 6-mannafør menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 07:19.03 |
| 2 | Jarnbardur | 07:19.24 |
| 3 | Strálan | 07:23.07 |
| 4 | Sundabáturin | 07:23.20 |
| 5 | Lómur | 07:26.23 |
| 6 | Víkingur | 07:27.21 |
| 7 | Páll Fangi | 07:28.14 |
| 8 | Stjørnan | 07:31.04 |
| 9 | Hósvíkingur | 07:35.01 |
| 10 | Sølmundur | 07:36.12 |
| 11 | Kollfriðingur | 07:42.05 |
| 12 | Fuglfirðingur | 07:48.18 |

## Góðkenning av áskoðarum

OYGGJALEIKIR
*tíðindaskriv*

Nú ber til at skráseta seg sum áskoðara til leikirnar í Hetlandi.

Fyrimunirnir við at lata seg skráseta eru m.a., ókeypis flutningur við serligu flutningstænastuni hjá leikunum og ein prentað skrá fyri leikirnar. Samstundis ber til at søkja um atgongumerki til svimjing og fimleik, ið eru einastu ítróttagreinarnar aftrat setanini, ið krevja atgongumerki.

Kostnaðurin fyri skrásetingina er £25 fyri vaksin og £15 fyri børn.

Við at seta seg í samband við Oyggjaleikanevndina fæst nærri vegleiðing um, hvussu tekningarskjal verður útfylt.